# Rolling Stones

í Horsens 3. september

Bert fá atgongumerki eftir!



sansir.fo

**Prísur bara 2.995,-**

**Konsertin er í Forum í Horsens sunnudagin tann 3. sept.**

Við í prísinum er: Flogferðaseðil við øllum avgjøldum knýtt at flogferðini, koyring við bussi frá Billund til Horsens og atgongumerki til konsertina.

Far til dømis til Billund fríggjadagin 1. sept.
og heim aftur mánadagin 4. sept.
Fá meira at vita um tínar møguleikar hjá okkum ella á tínari ferðaskrivstovu.

ALPHA Tel 352 900 · Faroe Travel Tel 342 600 · FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000 · FONN FLOG Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum · www.atlantic.fo



**SKEMMAN** | søkir handilslærling



# Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 1. oktober.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 1. september til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn

ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

petur & petur • 320870

Staravegur 7 · Tórshavn
Tel 315588 · Fax 310709

**SKEMMAN**



SANDOYARSTEVNAN 2006



## Hjartaliga vælkomin til Sands á Sandoyarstevnu 2006

Her hava vit búleikast í góð 1200 ár, og hóast vit í tíðarinnar høpi, taka fetini í smáum, so virkað, liva og fjølgast vit her. Vit eiga, uttan ov mikið av eginrósi, ein av fagrastu blettum undir stjørnuhválvinum. Og á herðum okkara hvílir stór ábyrgd, móti tí arvi sum vit skulu bera víðari til eftirkomarar okkara, á hesum kæra staði.

Vit liva í sera avbjóðandi tíðum, har alskyns streymar hála í viðbrekna sinni okkara. Hvussu stór fet kunnu vit loyva okkum at taka, og hvørji eiga vit at taka.

Undirsjóvartunnil og flogvøllur. Tvinni stór fet, sum koma at flyta Sandoynna, úr eyðmjúku útjaðarastøðuni, til breggjandi miðstaðin. Bæði kunnu vera veruleiki um stutta tíð. Serliga um vit hugsa um drúgvu tíðarrøtur okkara.

Í dag dregur Sandoyarstevnan okkum, og her er gott at vera. Hóast kappingin um børnini, pengarnar og tíðina harðnar, so eigur Sandoyarstevnan sína søgu, sum vónandi heldur á. Í dag ræður fyrst og fremst um at duga at laga seg. Broytast um ein vil liva, ella yvirliva. Ikki mist sum stevna.

Góðu stevnugestir og ferðafólk!
Njótið tíðina her í oynni. Vit eru fegin um at kunna bjóða tykkum tað eina løtu, ið vit Sandingar allar tíðir eiga. Vit vóna at bjóða tykkum blíðskap, fagra náttúru, og fótbólt sum boðar um formula komandi ár.

Góða Sandoyarstevnu øll somul!

Páll á Reynatúgvu,
borgarstjóri í Sands Kommunu

TRYGD OG TRIVNAÐUR FYRI ØLL

www.sandur.fo




# »Fiskivinnan við eitt vegamót«

**Fiskivinnuráðstevna á Sjómannadegnum 18. august**

## Skrá:

- 12.00: **Føroya Banki bjóðar kalt borð í KÍ-Caféini**

**Í SKÁLANUM:**

- 13.00: **Týdningurin av fiskiveiðuavtalum við onnur lond** (Jákup Sólstein)
- **Føroyska fiskivinnan 1940–2006 við veiðulýsing 1971-2005** (Jógvan Mørkøre)
- **Fiskidagaskipanin og støðan hjá feskfiskaflotanum** (Auðunn Konráðsson)

Steðgur

- **Íslendska fiskiveiðan samanborin við føroysku skipanina** (Magnus Þór Hafsteinsson)
- **Hvønn týdning hevur fiskivinnan út frá einum samfelagsligum sjónarmiði** (Magni Laksafoss)

Kaffi v.m.

- **Lønsemið og fígging av fiskiskipum** (Súni Schwartz Jacobsen)
- **Framleiðsla - kapping & váði í fiskivinnuni** (Reidar Nónfjall)

Steðgur

- **Roknskapargreining av fiskiflotanum við atliti til tilfeingisgjald** (Bjarni Poulsen)
- **Tilfeingisgjald sum teoretiskt hugtak innan tjóðarbúskap** (Magni Laksafoss)
- Uml. 17.30: **Samandráttur** (Jógvan Mørkøre & Jákup Sólstein)

Av tí at plássið er avmarkað, er neyðugt at boða frá luttøku. Vinarliga ring á 75 45 10, send fax til 45 70 79 ella send teldupost til megf@megf.fo innan 16. august á middegi og upplýs nøvnini á teimum, ið koma við. Kostnaður fyri luttøku, sum er kr. 300, skal vera fluttur á konto nr. 6460 173.866.8 innan somu freist.

REPROZ

**Føroya Reiðarafelag** **Meginfelag Útróðrarmanna**